Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 15

ISSN 0907-905X

Nr. 37 16. mai 2011

**Kunngerð**
**um**
**skráseting av hýru- og skúlavognum uttan skrásetingargjald**

Við heimild í § 7, stk. 2 í løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum, verður ásett:

**§ 1.** Loyvi til at skráseta hýruvogn ella skúlavogn uttan skrásetingargjald verður bert veitt, um akfarið verður nýtt til vinnuliga skúlakoyring ella vinnuliga hýruvognskoyring.
*Stk. 2.* Loyvi til at skráseta hýruvogn ella skúlavogn uttan skrásetingargjald verður bert givið tí, ið er skrásettur fyri viðkomandi akfar.

**§ 2.** Umsókn um loyvi til at skráseta akfarið uttan skrásetingargjald skal latast Akstovuni.
*Stk. 2.* Við umsóknini um loyvi til hýruvogn skulu fylgja avrit av:
1) koyrikorti, ið er áteknað til aksturvinnu,
2) hýruvognsloyvi, um umsøkjarin ynskir at skráseta akfar sum hýruvogn í kommunu, har kunngerð um standardhýruvognsreglugerð er galdandi og
3) dóps- ella navnaseðli.
*Stk. 3.* Við umsókn um loyvi til skúlavogn skal hjáleggjast avrit av:
1) koyrikorti, ið er áteknað við góðkenning sum koyrilærari og
2) dóps- ella navnaseðli.

**§ 3.** Tann, ið hevur loyvi at skráseta hýruvogn uttan skrásetingargjald, skal nágreiniliga føra koyribók, sum skal framvísast eftir áheitan frá TAKS.
*Stk. 2.* Koyribókin skal vera førd fyri alla koyring og skal í minsta lagi vísa dagfesting fyri, nær koyrt verður. Samstundis skal nágreinast soleiðis at:
1) kilometurteljarin við arbeiðsbyrjan verður lisin av og førdur í koyribókina,
2) kilometurteljarin við arbeiðslok verður lisin av og førdur í koyribókina og
3) koyrdir kilometrar og inntøka av koyringini verða førd í koyribókina.

**§ 4.** Tann, ið hevur loyvi at skráseta hýruvogn uttan skrásetingargjald, skal vátta koyrdar kilometrar og inntøkur av koyrdu kilometrunum. Inntøkan av koyringini skal kunna útgreinast fyri eitt ávíst tíðarskeið, ið TAKS ynskir lýst. Hýruvognurin skal latast til kilometuravlesing, tá TAKS biður um tað.
*Stk. 2.* Vegleiðandi fyri um talan er um hýruvogn sum vinnu kunnu hesi minstumørk ásetast fyri miðalinntøku pr. koyrdan kilometur.
1) Í Tórshavnar kommunu er 4,50 kr. fyri hvønn koyrdan km. vegleiðandi.
2) Á øðrum plássum er 4,00 kr. fyri hvønn koyrdan km. vegleiðandi.

**§ 5.** Gevur tann, ið hevur loyvi til skúlavogn uttan skrásetingargjald, frálæru til í minsta lagi 25 næmingar um árið, má ætlast, at talan er um skúlavognskoyring sum vinnu. Akstovan kann krevja tann, ið hevur skúlavognsloyvi eftir upplýsingum um m.a. tal av næmingum og samanbera hesar við egna skráseting, fyri at staðfesta, um akfarið verður brúkt til tað endamál, ið treytar frítøkuna frá at rinda skrásetingargjald.

**§ 6.** Um talan ikki er um vinnuligt virksemi fellur skrásetingargjaldið til gjaldingar.
*Stk. 2.* Kravið um gjalding av skrásetingargjaldinum verður tryggjað við veðrætti í hýru- ella skúlavogninum. Umsøkjarin rindar tinglýsingargjaldið.

**§ 7.** Akfar, ið verður skrásett sum hýru- ella skúlavognur, skal vera tryggjað fyri fult virði. Umsøkjarin rindar fyri veðhavaralýsing.

**§ 8.** Avgerðir hjá TAKS og Akstovuni kunnu kærast til Skatta- og Avgjaldskærunevndina innan 4 vikur eftir, at umsøkjarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.

**§ 9.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og er galdandi frá 1. mai 2011. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 21 frá 19. februar 2003 um skráseting av motorakførum.

Fíggjarmálaráðið, 16. mai 2011

**Aksel V. Johannesen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Atli Suni Leo (sign.)

Nr. 38 16. mai 2011

**Kunngerð**
**um**
**meirvirðisgjald fyri ikki vinnuligt og almannagagnligt frítíðarvirksemi**

Við heimild í § 3 a, stk. 3 í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald, sum broytt við løgtingslóg nr. 34 frá 30. apríl 2011, verður ásett:

**§ 1.** Henda kunngerð fevnir um íløgur, sum felagsskapir, stovnar og grunnar gera í ikki vinnuligt og almannagagnligt frítíðarvirksemi.
*Stk. 2.* Felagsskapir, stovnar og grunnar, sum gera íløgur í ikki vinnuligt og almannagagnligt frítíðarvirksemi skulu rinda meirvirðisgjald í landskassan av íløgum sínum samsvarandi galdandi reglum í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

**§ 2.** Meirvirðisgjald av íløgum í ikki vinnuligt og almannagagnligt frítíðarvirksemi verður afturgoldið til felagsskapir, stovnar og grunnar við 100% av inngangandi meirvirðisgjaldinum.

**§ 3.** Fíggjar- og kostnaðarætlanin av íløguni í ikki vinnuligt og almannagagnligt frítíðarvirksemi skal vera góðkend av statsautoriseraðum, skrásettum ella løggildum grannskoðara. Grannskoðarin skal í góðkenning sínari av fíggjar- og kostnaðarætlanini staðfesta, at íløgan er omanfyri 1 mió. kr. og at í minsta lagi 33% av samlaða íløgukostnaðinum, uttan meirvirðisgjald, er fingin til vega sum gáva
ella innsavna við óløntum og sjálvbodnum arbeiði, og at fígging er til alla íløguverkætlanina.

**§ 4.** Viðkomandi kommuna, har íløgan verður gjørd, hevur ábyrgdina av og skal góðkenna øll neyðug byggiteknisk myndugleikakrøv og –loyvi til íløguverkætlanina.

**§ 5.** Meirvirðisgjaldið verður endurrindað eftir umsókn, sum verður send TAKS. Fyri at kunna góðkenna umsóknina, skal TAKS, saman við umsókníni, hava góðkenningar frá grannskoðara og kommunu, sbrt. §§ 3 og 4.

**§ 6.** Tíðarfreist at lata inn uppgerðina er samsvarandi § 20, stk. 1 og 2 í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

**§ 7.** Samlaða endurgjaldið kann ikki verða hægri enn meirvirðisgjaldið í fíggjar- og kostnaðarætlanini, sum er góðkend av grannskoðara, sbrt. § 3.

**§ 8.** Endurgoldið meirvirðisgjald skal rindast aftur í landskassan eftir ásetingunum í kapittul 7 í kunngerð um lutfalsligan frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald og um javnan av inngangandi avgjaldi av íløgugøgnum, um íløgan verður seld ella ikki longur verður nýtt til ætlaða virksemið og til almannagagnligt frítíðarvirksemið.

**§ 9.** Avgerðir hjá TAKS kunnu kærast til Skatta- og avgjaldskærunevndina.

**§ 10.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2010 til 31. desember 2012.

Fíggjarmálaráðið, 16. mai 2011

**Aksel V. Johannesen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Atli Suni Leo (sign.)

Nr. 39 16. mai 2011

## Kunngerð um broyting í kunngerð um íløt, úrdráttir og pant

**§ 1**

Í kunngerð nr. 54 frá 31. mai 2007 um íløt, úrdráttir og pant, verður § 3, stk. 1, nr. 1 og 2 orðað soleiðis:

„1) Kr. 2,00 við MVG fyri endurfyllingaríløt, sum rúma 0,5 litrum ella minni.

2) Kr. 4,00 við MVG fyri endurfyllingaríløt, sum rúma meir enn 0,5 litrum.“

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Innlendismálaráðið, 16. mai 2011

**John Johannessen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rúni Joensen (sign.)

Nr. 40 16. mai 2011

## Kunngerð um broyting í kunngerð um adressur

Í kunngerð nr. 69 frá 13. oktober 2004 um adressur, verða gjørdar hesar broytingar:

### § 1

1) § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
„**§ 1.** Við adressu skilst eitt navn og eitt nummar við møguligum tilhoyrandi bókstavi, sum eintýtt sigur, hvar adressueindin sbrt. stk. 2 er, í býnum ella bygdini.“

2) Í § 1 verður sum stk. 3 sett:
„*Stk. 3.* Tá fleiri adressueindir hava somu inngongd, verður uppískoytið, ásett í § 4, stk 3, brúkt afturat ásetingunum í stk. 1.“

3) § 3 verður orðað soleiðis:
„**§ 3.** Adressa skal tillutast øllum bygningum, sum verða nýttir til:
1) bústaðarendamál,
2) frítíðarendamál,
3) vinnuendamál, og
4) virksemi hjá tí almenna.
*Stk. 2.* Somuleiðis kann adressa tillutast til annað virksemi, har nógv fólk kemur saman, t.d. ítróttaøki, parkeringsøki, kirkjugarðar o.a.
*Stk. 3.* Óbygdir eigindómar, har ætlanin er at byggja bygningar til endamál sbrt. stk. 1, skulu sum meginregla tillutast adressur.“

4) Í § 4, stk. 2 verður „sum uppískoyti“ broytt til: „afturat nummarinum“.

5) § 4, stk. 4, sum hereftir verður § 4, stk. 3, verður orðað soleiðis:
„*Stk. 3.* Uppískoyti til adressueindir eftir § 1, stk. 3, verða skipað soleiðis:
1) Hava adressueindirnar somu inngongd, skrásetur uppískoytið hæddirnar við tølunum: 0, 1, 2, 3 o.s.fr. Er kjallarahædd ikki undir jørð, verður henda skrásett sum hædd 0. Veghædd verður skrásett sum hædd 0.
2) Eru adressueindirnar undir jørð, skrásetur uppískoytið hesar við tølunum: 1, 2 o.s.fr.
3) Eru adressueindirnar á somu hædd, skrásetur uppískoytið hesar antin við frámerkjunum hm, mi, vm, ella við talmerkingunum: 1, 2, 3, 4 o.s.fr. Talmerkt verður við klokkuni.“

6) Í § 5, stk. 2, 2. pkt. verður „Stavir“ broytt til: „Bókstavir“.

7) Í § 8 verður: „samb. § 3, stk. 2“ broytt til: „sbrt. § 3, stk. 3“.

8) Í § 9 verður „Matrikulstovuni“ broytt til „Umhvørvisstovuni“.

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Innlendismálaráðið, 16. mai 2011

**John Johannessen** (**sign.**)
landsstýrismaður

/ Rúni Joensen (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705